# ÁRSFRÁSØGN
# 2014

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

# STATUS NULLHUGSJÓN

## 4 DEYÐ Í 2014

Í 2014 doyðu 4 í føroysku ferðsluni. Tvey í bili, ein til gongu og ein á súkklu. Hetta talið er høgt í mun til onnur Norðurlond. Í hinum Norðurlondunum er greiða rákið, at talið á deyðum í ferðsluni lækkar.

Samanbera vit við grannalond okkara við ferðsludeyðum pr. 100.000 íbúgvar, er greitt, at Føroyar aftur í ár hava munandi hægst tal á deyðum. Vit hava 8 deyð pr. 100.000, meðan hini norðurlondini hava millum 1,8 og 4,1. Svøríki, Noreg og Danmark eru tey londini sum í flest ár hava ligið niðarlaga við ferðsludeyðum og við støðugari minking ár um ár.

Í Danmark verður orsøkin til støðugt fallandi gongdina hildin at vera samskipað átøk millum Sikker Trafik, løgreglu, Vejdirektoratet, kommunur, Ferðslustýrið umframt tryggari vegir, herd revsing fyri rúsdrekkakoyring, meiri løgreglueftirlit og nýggj trygdartøkni.

Í Noregi verður víst til, at gransking vísir, at munandi øking í løgreglueftirliti hevði verið millum munabestu tiltøkini at minka um talið á deyðum í ferðsluni. Løgreglueftirlit avdúkar og steðgar teimum, sum koyra ov skjótt, ávirkað, brúka fartelefon ella ikki brúka trygdarbelti. Tað kann aftur forða fólki at skaða seg sjálv, síni nærmastu og onnur í ferðsluni. Halda fólk tað vera sannlíkt at verða tikin, bróta færri lógina. Hetta vísir greitt, at vit noyðast at seta ferðslutrygdina ovast á dagsskránna, tí vit koma ikki sovandi til tryggari ferðslu.

Í Føroyum hava vit tíverri ikki hagtøl og skaðakanningar, sum vísa orsakir til vanlukkur her á landi. Men hvørt tal í hesum hagtølum fjalir ein sorgarleik. Kring landið sita familjur í sorg eftir hesum deyðu i ferðsluni.

## TAL Á VANLUKKUM VIÐ FÓLKASKAÐA

Líka viðkomandi er at meta um gongdina í tali á ferðsluvanlukkum við fólkaskaða. Í londum rundanum okkum eru hagtøl fyri álvarsliga skadd og fyri smásnuddir. Føroysku hagtølini eru soleiðis háttað, at tey umfata øll, sum løgreglan á staðnum metir sum skadd, og sum verða koyrd á sjúkrahúsið til kanningar ella líknandi. Talan kann sostatt vera um alt frá einum skursli til 100 % óarbeiðsføri. Tí mugu hesi tøl verða tikin við fyrivarni. Skaðar, sum vísa seg seinni verða sjáldan skrásettir.

### DEYÐ Í FERÐSLUVANLUKKUM Í NORÐURLONDUM

**PR. 100.000 ÍBÚGVAR**



TAL Á VANLUKKUM VIÐ FÓLKASKAÐA




Sum sæst á myndini, er talið á ferðsluvanlukkum við fólkaskaða munandi lægri, enn málið, ið varð sett. At munurin er so stórur vísir, at málið ikki er nóg ambitiøst. Havast skal í huga, at málið varð sett í 2007 út frá data frá 2006, og hesi bæði árini vóru ser ring viðvíkjandi ferðslutrygd. Hetta er ein týdningarmikil lutur at endurskoða í møguligari dagførdari ferðslutrygdarætlan.

## FERÐSLUTRYGDARÆTLANIN GONGUR ÚT Í 2015

Upprunaliga ferðslutrygadrætlanin varð gjørd í 2007 í samstarvi millum løgreglu, Akstovuna, Landsverk og kommunur við Ráðnum fyri Ferðslutrygd sum samskipara.

## TÍ ER FERÐSLUTRYGDARÆTLANIN EITT UMRÁÐANDI AMBOÐ

Í ferðslutrygdarætlan verður greinað, hvørji stig loysa seg best at taka, fyri at færri skulu doyggja ella fáa álvarsligt mein í ferðsluni. Støði verður tikið í nýggjastu vitan og gransking hjá okkara grannalondum og í ES, og mett verður um, hvørji mál vit eiga at seta okkum fyri í Føroyum.
Hava vit onga dagførda ferðslutrygdarætlan, hava vit ongi mál og ítøkiliga virkisætlan á leiðini at røkka nullhugsjónini. Tað er serliga virkisætlanin sum ferðslutrygdarætlanin er – tvs ítøkilig átøk at arbeiða við her og nú.

Starvsnevndin hevði sum givið væntað, at landsstýrið eisini vildi hava ferðslutrygdarætlanina dagførda. RFF sendi Vinnumálaráðnum uppskot um arbeiðssetning í mars 2014 eftir áheitan frá landsstýrismanninum, og nú verður bíðað eftir, at landsstýrismaðurin setir gongd á arbeiðið.

## VINNUMÁLARÁÐIÐ MÁ TAKA STIG TIL DAGFØRDA FERÐSLUTRYGDARÆTLAN

Ferðslutrygdarætlanin er ein yvirskipað ætlan hjá øllum pørtum, sum arbeiða fyri at færri skulu doyggja í ferðsluni.
Verður ferðslutrygdarætlanin ikki dagførd, metir nevndin í RFF tað vera eitt álvarsligt bakstig og eina vandamikla undirmeting av týdninginum at skapa størri tryggari ferðslu.

## STATUS FYRI TILMÆLUM Í VERANDI FERÐSLUTRYGDARÆTLANINI

Starvsnevndin hevur í stuttum gjøgnumgingið tilmælini í verandi ferðslutrygdaætlan, og er komin fram til niðanfyristandandi yvirlit. Betri hevði verið, at gongd varð sett á eina nýggja ferðslutrygdarætlan og samstundis fingið dagført listan við átøkunum.

Niðanfyristandandi yvirlit kann tí als ikki verða mett sum ein dagføring, men bert ein meting við støði í okkara varhuga.

Her skal gerast vart við, at fleiri av tilmælunum standa sum gul, tað vil siga sum verandi 'ávegis', tó at hesi sum so ongantíð verða liðug. Hesi tilmæli eru í eini skipaðari tilgongd. Tey standa ikki sum grøn, tí uppgávan er ikki loyst um landið alt, har ætlanir eru um tað, til dømis tilmæli nr. 17, sum er nógvastaðni, og ætlandi fleiri aðra staðni komandi árini

**Status fyri tilmæli í ferðslutrygdarætlanini**
* : nakað av ávirkan | ** : miðal ávirkan | *** : stór ávirkan

**Reytt:** Ikki byrjað | **Gult:** Ávegis | **Grønt:** Gjøgnumført

| | **Ásett støða 2014** | |
|---|---|---|
| **34. Skaðakanning** | ● (reytt) | *** |
| **33. Hagtøl** | ● (reytt) | *** |
| **7. Sjálvvirkandi ferðkanningar** | ● (reytt) | *** |
| **35. Ferðslutrygdarbeiðið framyvir** | ● (reytt) | *** |
| **20. Beltiáminnari** | ● (reytt) | *** |
| **13. Seyður burtur av vegnum** | ● (reytt) | *** |
| **25. Venjingarbreyt** | ● (reytt) | ** |
| **5. Koyri- og hvílitíðarreglur** | ● (reytt) | * |
| **15. Landsvegir uttan um bygt øki** | ● (gult) | *** |
| **6. Løgreglueftirlit** | ● (gult) | *** |
| **28. Íbundin børn** | ● (gult) | *** |
| **32. Kommunalar ferðslutrygdarætl** | ● (gult) | *** |
| **27. Økt nýtsla av súkkluhjálmi** | ● (gult) | *** |
| **22. Átøk** | ● (gult) | *** |
| **16. Møguleikar fyri tryggari yvirhál.** | ● (gult) | *** |
| **12. Skilja bleyta ferðslu frá harðari** | ● (gult) | *** |
| **11. Ferðslutryggja vegamót** | ● (gult) | *** |
| **19. Talgilt vegakort** | ● (gult) | ** |
| **31. Kollektiva ferðslan** | ● (gult) | ** |
| **10. Hámarksferðin lagast til vegakerv** | ● (gult) | ** |
| **8. Próvalkometur** | ● (gult) | ** |
| **3. Øll í trygdarbelti** | ● (grønt) | *** |
| **4. Sektarhækking** | ● (grønt) | *** |
| **18. Ferðslutrygdargranskoðan** | ● (grønt) | *** |
| **24. Ferðgáar v.m.** | ● (grønt) | *** |

| | | |
|---|---|---|
| **17. Rumlistrípur** | ● | ***/** |
| **1. Promillumarkið lækkast** | ● | ** |
| **30. Koyrikortið til bil** | ● | ** |
| **29. Koyrikort til prutl** | ● | ** |
| **9. Indráttur av prutli** | ● | ** |
| **26. Ferðslufrálæra í dagst. og skúlum** | ● | ** |
| **2. Nullmark fyri onnur rúsandi evni** | ● | ** |
| **21. Stuðla trygdartiltøkum** | ● | ** |
| **23. Greiðari kunning um reglur fyri útskriving av heilivági** | ● | ** |
| **14. Dagføra tunlar** | ● | * |

## NORÐURLENDSKT SAMSTARV

Í august 2015 var Ráðið fyri Ferðslutrygd vertur fyri 2 daga fundi í norðurlendska samstarvinum, NTR (Nordiska Trafiksakerhedtrådet). Stjórarnir úr londunum Íslandi, Danmark, Noregi, Svøríki og Føroyum luttóku umframt nøkur starvsfólk afturat. Finnland var ikki umboðað. Allir stjórarnir uttan tann føroyski vóru nýggir. Greitt var, at allir stjórarnir vóru samdir í, at norðurlendska samstarvið er týdningarmikið og mennandi, men at okkurt virksemi skuldi dagførast:

- Framyvir verður ein árligur fundur heldur enn tveir sum higartil
- Heimasíðan hjá NTR verður niðurløgd
- NTR-prísurin veður niðurlagdur
- Skrivarin verður niðurlagdur, og vertslandið fær skrivaraleiklutin og fyrireikar dagsskrá

Umframt hetta løgdu londini fram kanningar, átøk og annað virksemi, sum arbeitt hevur verið við. Fundurin endaði við gongutúri av Hotel Føroyum til Kirkjubøar, har bóndin tók ímóti og greiddi frá søguni hjá bygdini í kirkjuni. Síðani varð farið í bóndagarðin til døgverða.

## EUROPEAN TRAFFIC SAFETY COUNCIL

Noreg og Danmark eru virknir partar av evropeiska ferðslutrygdarsamstarvinum, ETSC (European Traffic Safety Council). Norski og danski stjórin mettu norðurlendsku røddina at hava týdning í ETSC. Av tí at limagjaldið er høgt, eru hini norðurlondini (SV, IS og FØ) ikki við. Semja var um, at norski og danski stjórin kanna, í hvønn mun tað ber til at finna eitt slag av limaskapi, har eisini Svøríki, Ísland og Føroyar hava møguleika at luttaka í felagsskapinum.

# VIRKSEMI 2014

## UNDIRVÍSINGARTILFAR

Mánadagin 18. august 2014 bjóðaði Ferðslutrygd til móttøku við formligari handan av nýggja talgilda undirvísingartilfarinum í ferðslulæru. Hetta hjá Námi í Havn. Ferðslutrygd hevur staðið fyri verkætlanini í samstarvi við millum onnur Nám, skúlalærarar og aðrar avvarðandi partar.

Nám hevur frá byrjan tikið uppgávuna í stórum álvara og lagt ta neyðugu orkuna í at samstarva við Ráðið fyri Ferðslutrygd um at gera funkurnar klárar, og at hýsa trimum skeiðum fyri lærarum um tilfarið. Eisini Mentamálaráðið hevur verið sera samstarvssinnað, tá samstarvað hevur verið um læraravegleiðingar og námsætlanir í ferslulæru og skipan av tilvísingarbólki.

### TILFAR TIL 0.-10. FLOKK

Undirvísingartilfarið fevnir um øll floksstig í fólkaskúlanum. Í yngru flokkunum læra næmingarnar, hvussu teir eiga at bera seg rætt at til gongu í ferðsluni. Í framløgu og myndum verður viðgjørt, hvussu teir eiga hyggja fyri sær, hvussu tey brúka trygdarbelti og bilpútu og so framvegis. Við pinkuhjálmi, har eitt egg verður latið í, síggja næmingarnir á øðrvísi hátt, hvussu ein hjálmur verjir høvdið.

Tá næmingarnir eru eitt sindur eldri, er tilfar um endurskin og ástøði í at súkkla. Næmingarnir í elstu flokkunum arbeiða við hugburði til ferð, rúsdrekka, gáloysni og trygdarbelti. Her eru filmar, tilfar til felagsuppgávur eins og lagnusøgur úr bløðum og átøk hjá Ferðslutrygd eru tøk at arbeiða við sum kjak- ella stílaevni. Tilfarið er tøkt hjá øllum á www.snar.fo/ferdsla, og tí lætt atkomuligt hjá lærarum, foreldrum og næmingum og hartil óheft av fígging, tíð og staði.

### FERÐSLAN VANDAMEST HJÁ STÓRUM NÆMINGUM

Eins og í grannalondum okkara er líkt til, at tað, sum verður undirvíst í ferðslu, í mestan mun er í skúlabyrjanini. Hetta vísa millum annað kanningar, sum Ferðslutrygd ger í sambandi við árligu Ferðsludagarnar í Perluni. Lærarar og foreldur hava lyndi at halda, at tá børnini eru um 15 ára aldur, duga tey at venda sær í ferðsluni, so nú er lítið at fara eftir í so máta. Men hagtølini siga nakað annað: Tá børnini eru 15 ár, standa tey á gáttini til tey 10 vandamestu árini í ferðsluni. Tað er í hesum tíðarskeiði, at tey eru yvirumboðað í ferðsluvanlukkum, bæði sum skadd og deyð. Undirvísing í hesum árum er tí av størsta týdningi.

### FORELDUR SUM FYRIMYNDIR

At vanar hjá foreldrum hava týdning fyri hugburð og atferð hjá børnum, er flestum greitt. Nýggjar kanningar vísa, at foreldur sum fyrimyndir í ferðsluni hava meiri at siga fyri tannáringar enn teirra javnaldrar hava. Tí leggur undirvísingartilfarið upp til samstarv við foreldur við brøvum og á foreldrafundum.

### SAMSTARV ÍMILLUM TAÐ ALMENNA, TAÐ PRIVATA OG BRÚKARAN

Framleiðslan av undirvísingartilfarinum er fíggjað av inntøkunum av endurskinsvestum frá Guðrun og Guðrun, eins og Tryggingarfelagið Føroyar hevur stuðlað verkætlanini dyggiliga. Hetta gjørdi tað møguligt hjá Ráðnum at seta fólk at leiða og fremja verkætlanina at fáa til vega undirvísingartilfar. 1. januar 2013 setti Katrin Didriksen Apol, cand. mag. í miðlavísindi, skjøtul á verkætlanina. Tá hon fór í barnsburðarfarloyvi, tók Birna Abrahamsen, cand. negot. yvir.

Í røðu síni, har Regin Hammer, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar, handaði Birni Kalsø, landsstýrismanni í skúlamálum, undirvísingartilfarið, segði Regin millum annað: "Eg haldi, at tað er ein fragd at síggja, hvussu okkara verkætlan við endurskinsvestunum, sum kemur øllum til góðar, kann vera við at fíggja eina aðra verkætlan, sum kemur eins nógvum til góðar. Tað almenna, tað privata og brúkarin sjálvur hava samstarvað um eitt felags samfelagsmál, sum er ferðslutrygd á okkara vegakervi."

Vitjað hevur verið á flestøllum skúlum, har Ferðslutrygd hevur havt framløgu fyri skúlaleiðslum og nøkrum lærarum. Á smáplássum hava smærru skúlarnir verið bodnir til framløgur á størru skúlum. Eisini hava tvær framløgur verið á Læraraskúlanum fyri lærara- og pedagoglesandi á seinasta lestrarári.

Í vár verður gjørd umfatandi eftirmeting, sum skal vísa, í hvønn mun lærarar eru farnir í holt við at brúka tilfarið. Í september hevur Ferðslutrygd aftur skeið á Námi fyri lærarum.









# VIRKSEMI 2014 *framhald*

## FERÐSLUDAGAR Í PERLUNI

Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri landsins 8. flokkum eins og undanfarin ár – stuðlaðir av Trygd og Tryggingarfelagnum Føroyar.

**Á degnum verða næmingarnir kunnaðir á ymsan hátt um trygga atferð í ferðsluni:**

1. Við faktuellum upplýsingum
2. Persónligum samskifti, har næmingarnir verða tiknir upp í
3. Frásøgn hjá avvarðandi, sum hevur mist í ferðsluni

**Endamálið við Ferðsludøgunum er:**

- At tey ungu skilja avleiðingarnar og váða
- At tey ungu taka ábyrgd og duga at siga frá
- At tey verða eggjað til at taka trygg val í ferðsluni
- At tey grunda um ferðslu

### INNIHALD Í FERÐSLUDEGI

Næmingarnir møta um morgunin og eru ein heilan dag í Perluni.
Í fyrsta partinum eru trý, sum greiða frá tryggari atferð í ferðsluni: fyrst ein koyrilærari, síðani eitt løgreglufólk og at enda ein frá sjúkraflutningstænastuni. Tey leggja dent á teir fýra størstu vandarnar, sum oftast ganga aftur í álvarsligum ferðsluvanlukkum, tað eru:

- Ov nógv ferð
- Rúsdrekkakoyring
- Vantandi nýtsla av trygdarbelti og hjálmi
- Gáloysni – herundir nýtsla av fartelefonum í ferðsluni

Aftan á matarsteðgin kemur Hjálmar Dam, sum er sjónleikari, og samskiftir við næmingarnar, har hann møtir teim ungu í eygnahædd. Hann tekur eisini tey ungu uppí og fær tey at taka støðu til ymsar tvístøður, sum tey allarflestu ungu fyrr ella seinni koma í. Tey ungu samrøða eisini sínamillum. Tey sleppa sjálvi at gera niðurstøðurnar - tí tá er tað teirra veruleiki.

At enda kemur ein persónlig frásøgn frá veruleikanum. Tað er oftast ein mamma, sum hevur mist ein son, ella ein systur, sum hevur mist beiggja. Endamálið er at ávirka tey ungu kensluliga.

Eftirmetingarnar frá bæði næmingunum og lærarum vóru serstakliga góðar. Umframt at næmingarnir eftirmeta ferðsludagin, verða teir spurdir um hugburð og royndir í ferðsluni. Her var greitt, at tað kortini er nógv at arbeiða víðari við.

### ÚTVALDAR TALVUR ÚR HUGBURÐSKANNING AV 8. FLOKKUM

Í 8. flokki eru næmingar 14 og 15 ára gamlir. Kortini hava størri og minni partar av næmingunum roynt at sita í bili við rúsaðum bilførara og bilførara, sum teir meta koyrdi svakt.

Greitt er, at tað er eitt sindur ymiskt kring landið, hvørjar royndir næmingarnir hava:

**HEVUR TÚ VERIÐ Í BILI, HAR BILFØRARIN VAR RÚSAÐUR?**




Spurdir, um 8. floksnæmingarnir hava verið í bili, har bilførarin var rúsaður, játta millum 8 og 18 % av næmingunum. Hetta er eitt rættiliga stórt lop. Fæst næmingar úr miðstaðarøkinum hava hesa roynd, meðan útvið 5. hvør næmingur úr økinum, Suðuroy og Sandoyggin, hava hana. Væntandi orsøk til hetta er, at fólk í miðstaðarøkinum halda tað vera mest sannlíkt at møta løgregluni á gøtuni. Tað er væl skjalprógvað uttanlands, at tað virkar fyribyrgjandi, um løgreglan er sjónlig á vegnum.

Kortini er ein bati at hóma fyri landið tilsamans. í 2013 søgdu tilsamans 17,9 % seg hava verið í bili, har bilførarin var rúsaður og í 2014 var talið minkað niður í 11,2 %:




**KEMUR TAD FYRI, AT ONKUR TÚ KENNIR VÆL, KOYRIR VID KENNING?**



Greitt er, at rættiliga nógvir næmingarnir kenna onkran væl, sum koyrir við kenning – millum 17 og 20 % teirra.

Verður samanborið við 2013, er kortini ein bati at hóma, við tað at fleiri svara nei til at kenna onkran væl, sum koyrir við kenning. Men talið á teimum, sum játta, er at kalla óbroytt. Havandi í huga týdningin av vaksnum sum fyrimyndir hjá børnum, er órógvandi, at so mong 14-15 ára gomul kenna onkran væl, sum koyrir við kenning.




**HEVUR TÚ VERIÐ Í BILI, HAR TÚ HELT, AT BILFØRARIN KOYRDI SVAKT?**




65 % í 8. flokki søgdu seg hava verið í bili, har tey hildu bilføraran koyra svakt. Næmingar úr Norðoyggjum hava oftast roynt at koyrt svakt, sum tó ikki er munandi meiri enn hini ungu kring landið. Greitt er tó, at tað kann vera ymiskt, hvussu næmingarnir tulka, hvat tað er at koyra svakt. Lítil munur er á tølunum fyri 2013.




Samanumtikið er greitt, at royndirnar hjá teimum ungu í bili eru órógvandi. Her er talan um børn, har ein munandi partur longu hevur verið í eini váðafullari støðu. Greitt er tí, at vit langt frá hava rokkið málinum um ábyrgdarfulla atferð í ferðsluni.

# TRYGG ÍBINDING AV BØRNUM

Saman við Trygd gjørdi Ferðslutrygd í november í átak við boðskapi um, hvussu børn verða rætt íbundin á bilpútu.
Endamálið við átakinum var at minna vaksin á at binda børnini rætt í trygdarbelti í bilinum. Tá børn eru umleið 4 ár, fara tey úr barnastólinum og á bilpútu við stólabaki, sum skal brúkast, til tey eru í minsta lagi 135 cm sambært ferðslulógini. Tá eru mong umleið 10 ára gomul.

Norðurlendskar kanningar vísa, at millum 1/3 og helvtin av børnum í bili ikki sita rætt íbundin. Antin tí bilstólurin ella bilpútan ikki eru sett rætt í, ella tí foreldur ikki eru nóg hyggin at binda barnið rætt í. Kanningarnar vísa eisini, at vanligastu mistøkini eru, at trygdarbeltið liggur skeivt, tað vil siga undir armin, afturum bak ella á yvirarminum – ella at trygdarbeltið situr leyst. Harumframt at barnið situr í trygdarbelti men uttan bilpútu.

Fleståll kenna sangin, *'Høvd, akslar, knø og tær, knø og tær'*. Til hetta lagið var gjørdur sangurin, *Øksl, mjadnar, stramma væl,*sum var at hoyra í útvarpsrásum í tvær vikur.

## VIT VILJA TAÐ BESTA – MEN FÁA KLIPP

Gallupkanning, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd lat gera í august 2014, vísti, at 74 % av føroyingum av og á koyra við børnum undir 15 ár í bilinum. Av hesum søgdu 94 % seg tryggja sær, at børnini sótu rætt íbundin í góðkendari trygdarútgerð. Men vit vita frá kanningum hjá løgregluni, at klipp regluliga verða givin fyri, at børn ikki sita rætt íbundin í góðkendari trygdarútgerð. Seinastu 5 árini hava millum 50 og 134 klipp verið givin árliga fyri at hava børn undir 15 ár í bilinum, sum ikki eru rætt íbundin ella hava sitið leys.

**KOYRIR TÚ AV OG Á (SUM BILFØRARI) VIÐ BØRNUM UNDIR 15 ÁR Í BILINUM?**




Einans teir 514 respondentarnir,
ið eru omanfyri 17 ár.

© GALLUP

# VIRKSEMI 2014 *framhald*

**TÁ TÚ HEVUR BØRN UNDIR 15 ÁR Í BILINUM, TRYGGJAR TÚ TÆR SO, AT TEY SITA RÆTT ÍBUNDIN Í GÓÐKENDARI TRYGDARÚTGERÐ?**
(tvs. barnastóli ella selapútu/bilpútu, um tey hava tann aldurin/vekt/hædd)




## LØTT RÁÐ

Tað er tíbetur rættiliga lætt at binda børnini rætt í. Trygd og Ferðslutrygd vildu við átakinum geva foreldrum trý góð ráð:

**1.** Trygdarbeltið skal liggja um mjadnarnar og skal strammast væl. Er beltið leyst, kann tað leggja seg um búkin, og tað er vandamikið í samanstoyti. Tá er stórur vandi fyri skaða á gøgn.

**2.** Trygdarbeltið skal liggja um økslina, og ikki aftur um bak ella undir armin. Liggur beltið ikki um økslina, verður kroppurin tveittur frameftir, um bilurin rennir á. Tá er stórur vandi fyri skaða á høvd og nakka.

**3.** Stramma beltið væl, tó sjálvsagt ikki so fast, at barnið fær ilt.
At minnast hesi ráð kann verða munurin millum lív og deyða.

## PLAKATIR VIÐ GÓÐUM RÁÐUM

Umframt at sangurin var at hoyra á útvarpsrásum, vóru lýsingar á portalum og í bløðunum. Harumframt vórðu plakatir við góðu ráðunum latnar landsins barnagørðum og frítíðarskúlum.

## LØGREGLUEFTIRLIT SAMSTUNDIS

Sum í allarflestu átøkum hjá Ferðslutrygd varð samstarvað við løgregluna, sum gjørdi kanningar av børnum í bili.






# EINIR SKÓGVAR FYRI HVØNN FERÐSLUDEYÐAN FØROYING

Í 2014 var Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni sjónligur aðrastaðni enn í vegjaðaranum. 281 pør av skóm vórðu nevniliga sett á torgið í SMS: Einir skógvar fyri hvønn mann, hvørja kvinnu og hvørt barn, sum eru deyð í ferðsluni síðani tann fyrsti doyði í ferðsluni í 1928. Átakið varð skipað í samstarvi millum Tryggingarfelagið Føroyar og Ráðið fyri Ferðslutrygd.

## ENDAMÁL VIÐ SKÓM

Framsýningin varð sett upp fyri at styrkja tann boðskapin sum liggur í hesum minningardegnum: Í fyrra lagi at steðga deyðstalinum, sum var líka uppi á 281, og av hesum vóru 100 børn yngri enn 18 ár. Endamálið var at fyribyrgja fleiri vanlukkum. Mett var, at hetta var ein stillførur og siðiligur háttur at minnast tey, vit mistu.

## SKAL IKKI TIGAST BURTUR

Ætlanin var eisini at vísa á, at ferðsludeyði er makabur og ræðuligur, og hann verður ongantíð annað enn meiningsleysur. Og tað skal ikki tigast burtur. Tað er umráðandi, at vit seta orð á tað. Vit skulu tosa um, hvussu tað verður fyribyrgt – og upplýsa, hvussu tú og eg kunnu geva okkara íkast at steðga deyðstalinum.

## IKKI SKÓGVAR HJÁ TEIM DEYÐU

Tryggingarfelagið Føroyar keypti skógvarnar frá Reyða Krossi, Bláa Krossi og ymiskum loppumarknaðum. Mann legði seg eftir at keypa skógvar, sum ímyndaðu aldur og kyn hjá teimum, sum vit mistu í ferðsluni.







# FÓTBÓLTSLEIKARAR Í TRYGDARBELTUM

Í august mánaði spældu fótbóltsleikarar í fýra liðum í Effodeildini í troyggjum við trydarbelti á. Talan var um Skála, KÍ, B36 og Víking. Endamálið var at varpa ljós á týdningin av trygdarbeltum.

Tó at ásett varð við lóg í 1986, at øll skulu koyra íbundin trygdarbelti, er hetta alsamt ein avbjóðing í ferðsluni. Mett verður, at umleið helmingurin av teimum, sum eru deyð í ferðsluni síðan tá og ikki nýttu trygdarbelti ella fallhjálm (56 fólk til 2012), høvdu komið frá vanlukkuni við lívinum, varð belti/hjálmur nýtt/ur. Her er talan um mong lív í einum lítlum landi.

Átakið var samstarv millum Tryggingarfelagið Føroyar, Fótbóltssamband Føroya og Ferðslutrygd.



## VITJANIR KRING LANDIÐ

Í sambandi við átakið vitjaði Ferðslutrygd liðini og greiddi frá um týdningin av trygdarbelti fyri trygdina í ferðsluni. Trygdarbelti kann lættliga vera munurin millum lív og deyða. Eisini fingu leikararnir høvi at royna simulatorarnar, Gøll og Hvølvus, har teir kendu máttin hjá trygdarbeltinum í einum bráðsteðgi við 10 km/t, og hvussu tað er at bólta runt í einum akfari, eins og teir lærdu at loysa trygdarbeltið á rættan hátt, tá bilurin steðgar á takinum.

Umframt at átakið var sjónligt á føroysku fótbóltsvøllunum, var átakið við trygdarbeltum eisini sjónligt í sosialum miðlum.



# VIRKSEMI 2014 *framhald*

## FØROYA BJÓR OG FERÐSLUTRYGD MINTU Á AT STEÐGA RÚSDREKKA-KOYRING

Í tíðarskeiðnum, har jólaborðhald liggja, frá miðjum november til jólar, samstarvaðu Føroya Bjór og Ráðið fyri Ferðslutrygd um at byrgja fyri rúsdrekkakoyring. 'Vinir lova ikki vinum at koyra skít' var rakstrarróp eins og undanfarnu tvey árini.

Átakið var einamest at hoyra á útvarpsrásum og á internetinum. Við átakinum vórðu fólk eggjað til at leggja uppí, um tey varnaðust, at vinfólk, skyldfólk ella starvsfelagar ætlaðu at koyra ávirkað.

Flestøll venda sær frá rúsdrekkakoyring. Kortini er tað eitt kent fyribrigdi. Tað kann vera langt frá hugburði til atferð. Tá fólk hugna sær til jólaborðhaldini kring landið við góðum mati og drekka, kunnu koma støður, har fólk koyra ávirkað.




### VÍS KÆRLEIKA – LEGG UPPÍ

Greitt er í hagtølum, at menn í munandi størri mun enn kvinnur koyra við ov høgari promillu. Hetta varð víst við mynd av einum, ið hevur tikið billyklarnar frá vinmanninum. Boðskapurin var, at tað er umsorgan at forða rúsdrekkakoyring – eingin vil sínum vini so illa, at hann koyrir ávirkaður.

### RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD OG FØROYA BJÓR Í SAMSTARVI

"Hóast vit eru veitarar av rúsdrekka, vilja vit taka sosiala ábyrgd. Fyri okkara viðkomandi vóna vit at kunna vera við til at seta ferðslutrygd á dagsskrá. Rúsdrekkakoyring eiga vit altíð at fyribyrgja. Tað halda vit okkum gera væl við hesum samstarvinum við Ráðið fyri Ferðslutrygd," segði Sophus E. Dal Christiansen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Føroya Bjór í sambandi við samstarvsátakið.

Eisini Ferðslutrygd fegnaðist um samstarvið: "Okkara virksemi hevur frá byrjan partvís verið í samstarvi við fyritøkur. Føroya Bjór er ein natúrligur samstarvsfelagi, tá tað snýr seg um rúsdrekkakoyring, og vit fegnast mikið um, at tey vilja standa við okkara lið í átakinum," segði Brynhild Høgnadóttir frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

**Í HVØNN MUN HEVÐI TÚ ROYNT AT FORÐAÐ TÍ, UM TÚ SÁST EIN, SUM ÆTLAÐI SÆR AT KOYRA BIL, HÓAST HANN/HON HEVÐI DRUKKIÐ RÚSDREKKA?**

(Og væntandi hevði ov høga promillu)




nov-14

© GALLUP

### SOLEIÐIS LEGGJA VIT UPPÍ

Útlendskar kanningar vísa, at nógv tey flestu sótu saman við øðrum og drukku, áðrenn tey koyrdu ávirkað. Tað kann tó vera trupult at leggja uppí og steðga einum at seta seg við róðrið. Tí er skilagott at avtala ferðina heim, tá veitslan byrjar, so sleppast kann undan pínligum støðum. Átakið, 'Vinir lova ikki vinum at koyra skít' skal tí senda veitslugestir trygt heim frá jólaborðhaldum og øðrum veitslulag. Við átakinum vildu Føroya Bjór og Ráðið fyri Ferðslutrygd tí:

- ávirka fólk, sum kundu umhugsað at koyrt, tá tey hava smakkað sær á
- minna vinfólk, familju og starvsfelagar á at leggja uppí, um onkur ætlar at koyra ávirkað/ur.
- gera vart við, at tað er umsorgan at leggja uppí

Løgreglan gjørdi rúsdrekkakanningar, meðan átakið var.

## VERNDAREINGLAR

Hetta var triðja árið, at RFF í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar lótu einglaveingir til láns saman við tasku av endurskinum at býta út. Eins og bæði undanfarnu árini, vóru veingirnir sera væl móttiknir. Teir vórðu útlántir til alskyns tiltøk so sum tendring av jólatrøum, til jólaveitslur í skúlum ella bara har foreldur ella skúlastýri vóru kring skúlan ein vetrarmorgun í jólamánaðinum, tá næmingarnir møttu.






## HJÁLMAR

Afturvendandi átakið við hjálmum, har Trygd og Tryggingarfelagið Føroyar bæði stuðla lið um lið, var í 2014. Ferðslutrygd var við, tá næmingar úr Kommunuskúlanum fingu hjálmar handaðar.






## ENDURSKINSVESTAR

Vit vóru eisini við í Kommunuskúlanum, tá børnini nakrar vikur seinni fingu endurskinsvestar. Hetta er afturvendandi átak millum Tryggingarfelagið Føroyar og Ferðslutrygd. Hareftir varð farið ein túr í býin við løgregluni.



## 1-1-2-DAGUR

Triðja árið á rað hevur RFF luttikið í 1-1-2-degi, sum SSP samskipar. Endamálið við degnum er, at børnini fáa ein stuttligan og læruríkan dag um ferðslu, eldsbruna, bjarging og um at ringja 1-1-2. Øll barnagarðs-børn í Tórshavnar kommmunu, sum fóru í skúla heystið eftir, vórðu boðin. Hesaferð hevði Ferðslutrygd leitað sær inní Badmintonhøllina, har vit brúktu nýggja undirvísingartilfarið til 0.-1. flokk, sum er væl egnað til barnagarðsbørnini. Tað riggaði stak væl, og børnini sótu hug-savnað og settu viðkomandi spurningar. Ein fyrimunur var tað eisini, at spennandi sirenur, hundagoyggj og eldsbrunar ikki tóku uppmerksemið frá børnunum, meðan tey vitjaðu Ferðlsutrygd.

# VIRKSEMI 2014 *framhald*

## RFF VANN SAMAN VIÐ ØÐRUM TVÆR VIRÐISLØNIR FYRI 2014

Á ársveitsluni hjá Felagnum Føroysk Marknaðarfólk, ið er áhugafelag fyri fólk, ið arbeiða innan marknaðarføring í Føroyum, vóru ársins bestu føroysku lýsingar kosnar fríggjakvøldið, 14. november. Talan var um tríggjar ymiskar virðislønir, sum føroyski brúkarin hevði møguleika at atkvøða um. Fleiri hundraðtals føroyingar atkvøddu. Allir vinnararnir í ymisku kappingarbólkunum fingu meira enn fjórðu hvørja atkvøðu í hvørjum kappingarbólki. Ráðið fyri Ferðslutrygd vann tvær virðislønir í ár: Ársins átak og Ársins prentlýsing.

### ÁRSINS ÁTAK 2014

Saman við Tryggingarfelagnum Føroyar vann Ferðslutrygd fyri átakið, '281 deyð í ferðsluni', sum var átakið við skóm á torginum í SMS.



### ÁRSINS PRENTLÝSING 2014

Saman við FSF og Tryggingarfelagnum Føroyar vann Ráðið fyri Ferðslutrygd fyri felags átakið, 'Fótbóltsleikarar í trygdarbeltum'. Talan er um átakið, har fýra lið í Effo-deildini spældu við trygdarbelti á bringuni.



# VIRKSEMI Í 2015

## NÝGGJ HEIMASÍÐA

Arbeitt verður við dagførdari heimasíðu til Feðslutrygd. Hon verður væntandi klár 1. juni 2015. Katrin D. Apol hevur ábyrgd av hesum arbeiði. Heimasíðan fer at hava eitt meiri nútímans og innbjóðandi snið, eins og hon fer at vera munandi útbygd við kunnandi tilfari og nýggjum myndum.

## SAMSTARV FYRITØKUR

Arbeitt verður við at fáa í lag samstarv við fyritøkur um ferðslutrygga atferð í ferðsluni. Fleiri orsøkir eru til hetta. Hin fremsta er, at norsk kanning[2] vísir, at:

- vinnubilførarar til arbeiðis eru partur av 30 % av deyðsvanlukkum á norskum vegum
- vanlig starvsfólk, sum koyra í arbeiðistíðini, men ikki eru vinnubilførarar eru umfatað í 6 % av av deyðsvanlukkum
- 10 % av vanlukkunum umfata ein ella fleiri sum koyra til/frá arbeiði

Taka vit hædd fyri at fleiri av hesum kunnu vera partur av somu vanlukku, vísa úrslitini, at tilsamans 41 % av deyðsvanlukkum í Noregi umfata í minsta lagi ein bilførara sum hevur koyrt í sambandi við arbeiði ella er á veg til ella frá arbeiði.

*Corporate Social Responsibility*

At taka samfelagsábyrgd sum fyritøka hevur verið á lofti í vaksandi mun seinastu tíðina. Uppløgd dømi um føroyskar fyritøkur, sum taka sosiala ábyrgd, eru tey bæði tryggingarfeløgini, Trygd og Tryggingarfelagið Føroyar, sum saman stuðla ferðsluundirvísing fyri landsins 8. flokkum og við hjálmum til 1. floksnæmingar, umframt at tey hvør sær stuðla kunningartiltøkum hjá RFF.

Í 2015 fara vit at bjóða okkum til at samstarva við fleiri føroyskar fyritøkur um ferðslutrygd. Her síggja vit fyri okkum, at vit leggja fyritøkum lag á millum annað at samtykkja og verkseta ferðslutrygdarpolitikk í fyritøkuni, sum hevði bøtt um ferðslutrygdina í arbeiðstíð, men væntandi eisini uttanfyri arbeiðstíð.

[2] *Kartlegging av arbeidsrelaterte trafikkulykker. Analyse av dødsulykker i Norge fra 2005 til 2010. TØI rapport 1188/2012. Av Ross Owen Phillips og Sunniva Frislid Meyer*

## TRYGG ÍBINDING AV BØRNUM

Ætlandi fara vit at byggja á verandi átak um trygga íbinding av børnum í samstarvi við Trygd.

## FERÐ

Í 2014 var einki átak um ferð. Í ár er ætlanin at arbeiða við hugburðinum til ferð millum føroyingar í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar. Gallupkanning frá november 2014 vísir, at tað alsamt eru mong, ið bróta hámarksferðina. Hetta vísa eisini mátingar hjá Landsverki.

### HVUSSU OFTA KOYRIR TÚ SKJÓTARI ENN HÁMARKSFERÐINA?

(50 og/ella 80 km/t)







## ARBEITT VERÐUR VIÐ ØÐRUM ÁTØKUM

Arbeitt veðrur eisini við øðrum átøkum, sum tó ikki eru klár at verða avdúkað enn.

## RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD FYLLIR 40 ÁR HIN 19. JANUAR 2016

Nakað av virksemi í 2015 fer tí við at fyriskipa runda dagin.

RÁÐIÐ FYRI
FERÐSLUTRYGD

GRØNLANDSVEGUR 38 · 100 TÓRSHAVN · TEL. 220064 · TELDUPOSTUR: RFF@RFF.FO · WWW.RFF.FO